# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Míni børn og míni abbabørn velja Barrack Obama, men eg sigi ikki, hvønn eg fari at velja*

*(Jimmy Carter)*

# Teir skuldu fremja heimsins størstu yvirgangsatsókn

**Sambært bretska ákæruvaldinum ætlaðu teir átta menninir at leggja bumbur í minst sjey flogfør, sum skuldu úr London til USA og Kanada**



*Teir átta ákærdu. Ovast frá vinstru: Abdul Ahmed Ali (27 ár), Assad Sarwar (24 ár), Tanvir Hussain (27 ár) og Mohammed Gulzar (26 ár). Í neðra frá vinstru: :Ibrahim Savant (27 ár), Arafat Waheed Khan (26 ár), Waheed Zaman (23 ár) og Umar Islam (29 ár). (Mynd: Polfoto)*

Hevur bretska ákæruvaldið rætt, og hevði tað eydnast monnunum at fremja sínar ætlanir, hevði atsóknin kravt fleiri mannalív enn nøkur onnur yvirgangsatsókn. Teir ætlaðu at leggja nakrar heimagjørdar bumbur umborð á minst sjey flogfør, og bumburnar skuldu so bresta, meðan flogførini vóru á veg úr London til ymsar býir í USA og Kanada.

Bretska ákæruvaldið vil vera við, at teir átta menninir ætlaðu at spræna flótandi spreingievni í sodavatnsfløskur, og fyri at gera spreingingina serliga harða skuldi eitt sindur av einum søtum drykki sprænast í fløskurnar.

Peter Wright, sum er ákæri í málinum, segði í rættinum í London í gjár, at Abdul Ahmed Ali, Assad Sarwar og Mohammed Gulzar vóru høvuðsmenninir aftan fyri ætlanina. Teir báðir fyrru vórðu tiknir í London tann 9. august í 2006, eftir at løgreglan hevði eygleitt ein fund teirra millum.

### Funnu upplýsingar

- Tað var heilt týðiligt, at teir báðir vóru við til at leggja eina yvirgangsatsókn til rættis, segði Peter Wright, tá hann las ákæruritið.

Í einum lumma hjá Abdul Ahmed Ali fann løgreglan eitt minniskort, og tá løgreglumenninir koyrdu tað í telduna, vísti tað seg, at á kortinum vóru ferðaætlanir hjá flogførum, sum skuldu úr Heathrow-floghavnini, upplýsingar um viðføri, trygdareftirlit og ymsar aðrar upplýsigar um floghavnina. Tað sást, at nakrar ávísar flogferðir høvdu serligan áhuga, og var talan um flogfør, sum skuldu úr London til Montreal, Toronto, San Fransisco, Chicago, New York og til Washington í tíðarskeiðinum millum august í 2006 og august í 2007. Á samrøðuni millum Abdul Ahmed Ali og Assad Sarwar skilst løgreglan, at 18 sjálvmorðsbumbumenn skuldu fullføra atsóknirnar.

Sambært ákæruvaldinum vóru teir átta lidnir við fyrireikingarnar, tá teir vórðu tiknir. Allir teir ákærdu nokta seg sekar.

# Bíðaði 14 ár eftir deyðanum

**Í 14 ár var Glen Edward Chapman á deyðagongini í einum amerikonskum fongsli og bíðaði eftir at verða avrættaður. Nú er hann latin leysur**

Glen Edward Chapman varð dømdur til deyða í 1994 fyri at hava beint fyri tveimum kvinnum tvey ár frammanundan, hóast hann noktaði seg sekan. Tær báðar kvinnurnar vórðu funnar myrdar í tveimum húsum í statinum North Carolina.

Tey næstu 13 árini sat Glen Edward Chapman og bíðaði eftir, at deyðadómurin bleiv fullførdur, meðan verji hansara royndi at fáa hann frídømdan, tí alt ruggaði ikki rætt í málsviðgerðini.

Í nevembur í fjør kom vend í málið, tá ein dómari staðfesti, at Chapman hevði ikki fingið ta løgfrøðiligu hjálp, sum lógin tryggjar honum, og harafturat hevði løgreglan dult ymsar upplýsingar.

Nú hevur ákæruvaldið tikið avgerðina hjá dómaranum til eftirtektar, og eftir 14 ár á deyðagongini er Glen Edward Chapman frælsur maður, skrivar AP.



*Glen Edward Chapman er aftur frælsur maður*

## STUTT SAGT

### Sólin onga ávirkan

Vísindamenn siga seg nú hava funnið enn fleiri ábendingar um, at broytingar í hitaviðurskiftunum á sólini ávirka ikki veðurlagið á Jørðini. Fleiri vísindafólk hava leingið hildið uppá, at teir sokallaðu sólvindarnir ávirka veðurlagið og fyrst og fremst hitan á Jørðini. Men vísindamenn á lærda háskúlanum í Lancaster siga nú, at tað finnast eingi tekin um, at sólvindarnir ávirkan hitan á Jørðini.

### Kanna morð

Altjóða løgreglusamstarvið Interpol er nú farið at kanna morðið á bretsku gentuna Scarlett Keeling. Hon varð funnin deyð á einari strond í Goa í India í næstsíðsta mánað. Indisku myndugleikarnir vildu upprunaliga vera við, at Scarlett Keeling var druknað, men ta frágreiðingina vildi mamma Scarlett ikki góðtaka. Hon kravdi nýggja líkskoðan, og hon vísti, at gentan var vorðin neyðtikin og síðani druknað. Sjálv heldur mamman, at málið hevur samband við eitt rúsevnaharkalið, sum hevur so stórt vald, at indiska løgreglan royndi at dylja sannleikan.

### Gjald fyri býar koyring

Í framtíðini fer tað kanska at kosta pengar at koyra bil í teimum størru býunum í Danmark. Í Keypmannahavn hava teir kommunalu politikararnir leingi umhugsað at krevja pengar frá teimum, sum brúka bil inni í miðbýnum, og nú frættist, at sama hugskot verður umhugsað í Århus og í Odense. Anker Boye, býráðslimur í Odense og fyrrverandi formaður í danska kommunufelagnum, sigur við DR, at eftir metingum fer danska bilferðslan at veksa 70 prosent næstu 20 árini, og tí verða avmarkingar neyðugar, sigur hann.